# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívtv andøvsgul av vestri og okkurt ælið, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og eitt skifti regn. Seinnapartin hvassur vindur av útnyrðingi og vátaslettings- ella kavaælingur. Hitalagið millum ÷2 og +1 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hvassur vindur ella skrið av útsynningi og regn. Seinnapartin skrið av vestri og ælingur, partvís kavi. Hitin millum 1 og 4 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Hvassur vindur av vestri og útnyrðingi og ælingur, sunnudagin partvís kavi. Eisini sólglottar og hitalagið millum ÷1 og +3 stig.



*Bilurin rullaði út av parkeringsøkinum, tvørtur um veg og gongubreyt, men steðgaði á beinkinum*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Steðgaði á beinkinum

*Ein bilførari gloymdi at hála handbremsuna upp, tá hann setti bilin frá sær á parkeringsøkinum á Skálatrøð í Havn gjáramorgunin. Men tíbetur forðaði ein bonkur fyri, at bilurin fór á bláman*

EIRIKUR LINDENSKOV

Hóast óheppin var kortini talan um hepni, tá ein bilførari gjáramorgunin hevði gloymt at hálað í handbremsuna, tá hann setti bilin frá sær á parkeringsøkinum á Skálatrøð í Havn.

Bilurin rullaði út av parkeringsplássinum, tvørtur um vegin og gongubreytina, men steðgaði, tá hann rakti beinkin, ið stendur við gøtuni fram við sjóvarmálanum.

Fólk var á gongubreytini, tá bilurin kom rullandi, men tíbetur fekk onkur varskógvað, so eingin skaði hendi, men tað var um reppið, søgdu fólk á staðnum við Sosialin.

Annars eru fýra mans tiknir fyri at koyra við kenning um vikuskiftið. Suni Vinther á Politistøðini í Havn sigur, at løgreglan leygarmorgunin um hálvgum fimmtíðina tók ein 20 ára gamlan mann fyri at koyra ávirkaður av rúsdrekka. Sunnumorgunin klokkan hálvgum seks var ein 27 ára gamal maður tikin og løtu seinni ein annar 20 ára gamal maður. Sama kvøldið var ein 36 ára gamal tikin á landsvegnum á Sundi - eisini fyri at koyra ávirkaður av rúsdrekka.

Leygarmorgunin hevur onkur gjørt herverk í Sjónleikarhúsinum í Havn, har ein rútur á eystursíðuni var brotin, eins og skaði varð gjørdur á ein bil, ið stóð parkeraður aftan fyri Sjónleikarhúsið.

Annars gjørdi løgreglan grein 13 kanningar í Havn fríggjadagin, har 90 bilar vórðu kannaðir. 17 teirra vórðu uppskrivaðir og kunnu rokna við at fáa eina heilsan frá løgregluni.

Nú er aftur tíðin komin, har løgreglan verður send út at klippa nummarplatur. Hesaferð er tað tí, at trygging ikki er goldin.

Suni Vinther sigur, at 42 bilar standa á listanum kring landið - og at teir á fleiri plássum eru farnir at klippa.

Plátuklippingin kring landið sær soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Havn | 17 |
| Klaksvík | 5 |
| Runavík | 9 |
| Vestmanna | 1 |
| Vágar | 3 |
| Sandur | 2 |
| Suðuroy | 5 |
| Íalt | 42 |




Hátrýstið vestanfyri Skotland stendur mestsum í stað og viknar nakað.




Lágtrýstið við New Foundland fer í landnyrðing og dýpist nógv og verður væntandi við Føroyar fríggjadagin.




**Hitalagið mált frá 24./01. kl 06[00]–25./01. kl 06[00]. Hitin í gjár: 3,8°C**
Minsti hiti máldur í jan.: **÷8,8°** Mesti hiti máldur í jan.: **11,6°**




Avfallið: 0,0 mm – **mált frá 24./01. kl 6[00]–25./01. kl 06[00]**
Avfallið higartil í januar: 115,0 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷1 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | ÷2 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 4 |
| Tromsø | ÷3 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | ÷7 |
| Keypmannahavn | ÷1 |
| Helsinki | ÷16 |
| Moskva | ÷17 |
| Berlin | ÷3 |
| Warzawa | ÷8 |
| Kiev | ÷13 |
| Bukarest | ÷6 |
| Paris | 0 |
| Madrid | 4 |
| Róm | 8 |
| Malorca | 8 |
| Athen | 9 |
| Malta | 11 |
| Tunis | 9 |
| Beijing | ÷4 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 2 |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 33 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 26 |




**Skipað verður fyri frálæru í argentinskum tango v/ Gunner Svendsen vikuskiftið 28. - 30. januar 2000.**

**Dansað verður soleiðis:**

| | |
|---|---|
| 28. jan. | Hold 1: 19:00-20:15 (byrjarar og tey sum vilja finna stevið aftur)<br>Hold 2: 20:15-21:30 (vand)<br>Hold 3: 21:30-22:45 (vand) |
| 29.-30. jan. | Hold 1: 13:00-14:30<br>Hold 2: 14:30-16:00<br>Hold 3: 16:00-17:30 |

**Kostnaður fyri hvønn: kr. 300.-**

**Tilmelding verður sum vant hjá:**
**Siri: 31 05 06 ella 21 05 06**
**e-mail: siri@post.olivant.fo**

**Gunnhild: 31 87 06 ella 21 87 06**
**e-mail: gro@post.olivant.fo**

**www.vit.fo/tango**
**tekstvarpssíða: 620**

www.sosialurin.fo

## Vestfalskyrrindi

19. januar: Mánin næstur jørðini
21. januar: Fullmáni
28. januar: Seinna kvarter
1. februar: Mánin longst frá jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. jan. | 0951 | 2212 | 0851 | 2112 | 0906 | 2127 | 1151 | – | 0030 | 1251 | 0806 | 2027 | 0706 | 1927 | 1006 | 2227 | 1106 | 2327 | 0936 | 2157 | 1051 | 2312 |
| 27. jan. | 1037 | 2300 | 0937 | 2200 | 0952 | 2215 | 0012 | 1237 | 0112 | 1337 | 0852 | 2115 | 0752 | 2015 | 1052 | 2315 | 1152 | – | 1022 | 2245 | 1137 | – |
| 28. jan. | 1127 | 2356 | 1027 | 2256 | 1042 | 2311 | 0100 | 1327 | 0200 | 1427 | 0942 | 2211 | 0842 | 2111 | 1142 | – | 0015 | 1242 | 1112 | 2341 | 0000 | 1227 |
| 29. jan. | – | 1228 | 1128 | – | 1143 | – | 0156 | 1428 | 0256 | 1528 | 1043 | 2318 | 0943 | 2218 | 0011 | 1243 | 0111 | 1343 | – | 1213 | 0056 | 1328 |